Landssjúkrahúsið




# Gastroskopi

## Kikarakanning av vælindi, magasekki og tólvfingratarmi

**Hvat er ein gastroskopi?**
Gastroskopi er ein kikarakanning av vælindi, magasekki og tólvfingratarmi. Læknin sær rovuna og um broytingar eru. Ígjøgnum eina kanal í kikaranum, ber til at taka vevna frá til kanningar.

**Fyrireikingar til kanningina**
Tað er umráðandi, at magasekkurin er tómur áðrenn kanningina. Tú mást ikki eta 4 tímar áðrenn kanningina, men kann drekka vatn / saft 2 tímar áðrenn kanningin. Ikki drekka mjólk.

**Heilivágur**
Lívsneyðugur heilivágur kann takast ikki seinri enn 2 tímar áðrenn kanningina saman við einum glasi av vatni. Annar heilivágur má bíða til eftir kanningina.

Hevur tú insulinkrevjandi sukursjúku og hevur nakrar spurningar, ert tú vælkonin at seta teg í samband við deildina.
Tekur tú blóðtynnandi heilivág, set teg í samband við okkum.

**Kanningin**
Sjálv kanningin tekur 5 – 15 min. Tú verður lagdur á eina legu, á vinstru lið. Ein slanga ( til tjúgdar sum lítlifingur) verður førd inn í munnin og niður í magan.

Hetta kann gera, at tú fær vaml og tekur á at spýggja, men tað gongur yvir tá slangan er komin niður í magan.

Fyri at síggja, so væl sum til ber, verður luft blást gjøgnum kikaran, hetta kann geva eitt sindur av magapínu. Luftin verður sogin út aftur áðrenn kanningin er liðug.

Fyri at minka um vamlið, er tað umráðandi, at tú andar róliga meðan kanningin verður gjørd.
Slangan skal niður í vælindið og ávirkar ikki luftrørið.

**Eftir kanningina**
Læknin kann beinanvegin siga tær, hvat hann hevur sæð og møguliga seta teg í viðgerð. Er vevnaður tikin frá, ganga 1-2 vikur til svar er, og verður tá tosað við læknan um møguliga viðgerð.



Eftir kanningina kanst tú verða sárur og eymur í hálsinum.
Somuleiðis kanst tú hava luft í búkinum og møguliga leyst lív.

Fært tú sterka magapínu, blóð ella svarta spýggju, skalt tú venda tær til kommunulæknan ella vaktlækna.

Dagført: mai 2015

Tú kanst lesa meira um deildina á www.ls.fo, har tú eisini finnur vegleiðing um, hvar tú skal møta.

Ber ikki til at koma ásettu tíð, er umráðandi at siga frá sum skjótast, so møguleiki er at innkalla annan sjúkling. Um tú hevur móttikið hetta skrivið í Mínboks, ber til at svara og samskifta umvegis Mínboks. Somuleiðis ber til at senda teldupost til skurdinfo@ls.fo. Telefontíð er millum kl. 14:00 og 15:00 gerandisdagar á telefon 304734

Um tú ikki hevur fingið hetta skriv í Mínboks, er møguleiki at tekna teg á www.minboks.fo.

Hetta fer at gera arbeiði okkara bæði lættari og skjótari, til gagns fyri teg.

Dagført: feb. 2017

Landssjúkrahúsið

Endoskopieindin

tel 304500 ww.ls.fo